## Air Force One fleyg lágt

Fólk tustu út úr háhúsunum á Manhattan í New York í gjár, tá Boeing 747-flogfarið hjá amerikanska forsetanum fleyg lágt uppi yvir syðra enda av Manhattan og Hudson-ánni. Fólk, sum sóu flogfarið, mintust tað, sum hendi tann 11. september í 2001, og tóku til beins. Men einki hendi, og Hvítu Húsini hava biðið fólk um umbering. Sambært embætismonnum fleyg flogfarið eina serliga leið orsakað av einari filmsupptøku, men Michael Bloomberg, borgarstjóri í New York, heldur, at Hvítu Húsini skuldu havt kunnað betur um flogtúrin. Vit kunnu skoyta uppí, at Barrack Obama var ikki í flogfarinum.



## Inga Dahl forkvinna í Havnar Framburðsfelag

Herfyri hevði Havnar Framburðsfelag ársaðalund. Í nevndina vóru vald: Inga Dahl, Jan Christiansen og Hans Norðfoss, ið eru nývald. Winnie H. Andreasen og Marita Hentze vóru afturvaldar. Nevndin hevur skipað seg við Ingu Dahl sum forkvinnu, Hans Norðfoss, næstformanni, Maritu Hentze, kassameistara. Jan Christiansen og Winnie Hentze Andreasen eru nevndarlimir.

# Útveitið almennar tænastur

**Í fyrilestri hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag seinasta mikukvøld segði Marita Rasmussen, at neyðugt verður hjá landinum at raðfesta íløgur, eins og tað verður neyðugt við nýggjum íløgum so samfelagið er til reiðar, tá tíðirnar aftur gerast betri**

FYRILESTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, mælir til, at funnið verður fram til, hvørjar almenar tænastur kunnu útveitast, og at hetta síðani verður gjørt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Støðan her heima hjá okkum er jú, at vit eisini eru rakt av teirri fíggjar- og búskaparkreppu, sum herjar um allan heim, og vit síggja, at tað er eitt fall í eftirspurninginum, bæði innan- og uttanlands. Men samstundis síggja vit tað, at vinnan ger tað, sum hon eigur at gera. Hon repar seglini eitt sindur, hugsar seg um og er eitt sindur varin, segði Marita Rasmussen.

Hon heldur eisini, at tað er neyðugt, at tað almenna eisini ger sína skyldu í hesum døgum og heldur virkseminum í gongd fyri at halda hjólunum malandi.

Í fyrilestrinum nam stjórin í Vinnuhúsinum við, at fleiri dømir seinastu tíðina eru um, at vinnuni eru álagdar eyka byrðar, og tað er ikki vegurin at ganga í hesum døgum.

- Eitt annað, sum vit eisini meta man skal vera varin við, er at seta skipanir í verk, sum eru við til at avlaga arbeiðsmarknaðin, segði Marita Rasmussen.

So í staðin fyri at avlaga eigur politiski myndugleikin at optimalisera so sum mest kann koma burtur úr.

Stjórin í Vinnuhúsinum mælir til, at almennar tænastur verða útveittar. Hon mælir til, at tað fer ein gjøgnumgongd fram yvir tænastur, sum kunnu útveitast, og at hetta síðani verður gjørt. Á tann hátt ber til at rationalisera hjá tí almenna.

- Tað átti at verið hugt at almennum útreiðslum í heila tikið, tí tær eru ógvuliga nógv vaksnar seinastu árini. Eisini átti tað almenna at gjørt íløgur nú, tá vit hava ein mangul upp á eftirspurning, og harvið stimbra eftirspurningin í Føroyum, segði Marita Rasmussen.

### Til reiðar til uppsving

Stjórin í Vinnuhúsinum nam eisini við eitt annað eymt punkt, nevniliga sjómannafrádráttin.

- Hetta er ein serskipan sum ger, at tú fastheldur arbeiðsmegi í einum ávísum sektori, og vit sóu tað serliga væl, tá eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi var serliga stórur í Føroyum, at tað var sera torført hjá øðrum vinnum, eitt nú flakavinnuni og alivinnuni, at fáa skikkað starvsfólk, segði Marita Rasmussen.

Við skattalættanum eru umstøðurnar í fiskivinnuni nógv betri, og tískil er ikki jøvn kapping millum vinnugreinarnar um arbeiðsmegina. Men hóast stjórin í Vinnuhúsinum sostatt ynskir at fáa slíkar serskipanir avtiknar, so vísir hon á, at slíkt verður ikki gjørt yvir eina nátt.

- Vit mugu tillaga okkum framtíðina við at taka eina slíka serskipan av í stigum, tí vit mugu eisini ansa eftir ikki at taka grundarlagið undan einari vinnu, sum hevur tillagað seg tann veruleika, at skipanin finst,. So tað er av týdningi, at hon verður niðurlagað spakuliga, segði Marita Rasmussen.

Stjórin í Vinnuhúsinum nevndi eisini, at tað almenna eigur at bera so í bandi, at samfelagið er til reiðar at taka ímóti broyttu tíðunum, tá hesar gerast betri aftur.

- Tað hoyrist jú í fjølmiðlunum, at fólk hava trupulleikar við at fáa síni børn ansað, og vit hoyra um, at tey eldru ikki fáa pláss á røktarheimum. Vit hoyra um skúlar, sum eru niðurslitnir. Tá búskaparvøkstur verður aftur og uppsving verður í búskapinum, hevur tað týdning, at øll, sum kunnu, sleppa til arbeiðis aftur, uttan at tað skal vera ein trupulleiki at fáa børnini ansað og tey eldru passað, segði Marita Rasmussen.

Tað er tí av týdningi, at tað almenna setir nøkur arbeiði í gongd so samfelagið er til reiðar, tá uppgangstíðir aftur verða í búskapinum.

# Mugu raðfesta neyvt

**Á fíggjarlógini fyri komandi ár róði Jóhan Dahl fram undir, at skipasmíð skal raðfestast av landsstýrinum. Eitt nýtt havrannsóknarskip er projekterað eins og ein Nólsoyarferja**

SKIPASMÍÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Jóhan Dahl nevndi nýtt havrannsóknarskip sum ein møguleika fyri virksemi á fíggjarlógini fyri komandi ár*

Við á fundinum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag var eisini vinnumálaráðharrin, Jóhan Dahl. Hann nam við fleiri tættir innan føroyskt vinnulív, millum annað alivinnuna, sum aftur stendur í blóma.

Hann kom eisini inn á týdningin av at raðfesta íløgurnar rætt, og í hesum sambandi nevndi hann týdningin av at føroysku skipasmiðjurnar halda handverkið við líka.

Hann nevndi, at eitt nýtt havrannsókinarskip er projekterað, og róði upp undir, at hetta var ein uppløgd íløga í fíggjarlógini fyri komandi ár. Hann segði seg vóna og rokna við, at føroyskar skipasmiðjur eru kappingarførar í prísi eins væl og í góðsku og vísti á, at skipið er projekterað í samsvarvi við MEST.

Eisini er skitsuprojekt gjørt til eina nýggja Nólsoyarferju, og tað kundi eisini verið ein møguleiki, men nýtt havrannsóknarskip tykist sum fyrsta val.

Á sama fundi – sí grein omanfyri – mælti stjórin í Vinnuhúsinum, Marita Rasmussen, til at tað almenna ger íløgur fyri at halda virkseminum uppi eins og mælt verður til at geara samfelagið til aftur verða uppgangstíðir.

Hetta við skipasmíði var so nevnt sum ein realistiskur møguleiki á hesum fundinum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag seinasta mikukvøld.